

# Faroe Petroleum bora tveir brunnar í Norra

Jan Müller

25.10.2013 - 17:30

Oljan.fo

Norskir umhvørvismyndugleikar hava givið grønt ljós at bora brunnarnar Novus og Butch á norska landgrunninum. Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum er við í báðum brunnunum, í Novus sum fyristøðufelag. Novus leitimiðið liggur í Norskahavinum. Ætlanin var at byrja boringina í oktober men er nú sett til november.
Faroe Petroleum er fyristøðufelag við 50%. Hini feløgini eru Centrica við 40% og Skagen44 við 10%. Borað verður við boriskipinum West Navion.

Hin boriverkætlanin er á Butch-leitimiðinum, har oljufelagið Centrica er fyristøðufelag. Pallurin "Maersk Giant." verður brúktur til boringina. Talan er um at bora tveir brunnar á tveimum ymsum Butch-leitimiðjum.
Hesar boringar verða gjørdar í sama umhvørvi, har olja varð funnin í 2011. Hesaferð verður eisini testað. Samlaða boritíðin fyri alla verkætlanina er mett til 300 samdøgur.

Butch-feltið er í syðra partinum av Norðsjónum, norðan fyri Ekofisk og nær Ula.
Endamálið við boringunum er at kanna goymsluna og hvussu víða hon røkkur.

Centrica Resources (Norge) AS er fyristøðufelag og hevur 40 prosent, Suncor Energy Norge AS 30 prosent , Faroe Petroleum Norge AS 15 prosent og Tullow Oil AS 15 prosent.
Faroe Petroleum, sum hevur eina sera stóra og virkna boriskrá komandi mánaðirnar, er í løtuni partur av Snilehorn boringini á norska landgrunninum, har Statoil er fyrisitøðufelag.